## Heimsins vakrasti toskur í Árnafirði

Nú er staðfest, at alitoskurin á Árnafirði undan lívfiski á Føroya Banka, er tann toskur, sum veksur skjótast í verðini. - Harafturat er hann tann flottasti toskurin, eg nakrantíð havi sæð, sigur Arne G. Kolbeinshavn, sum ivaleyst veit mest sum toskaaling í Noreg. Í eini fyribils frágreiðing frá toskaalingini á Árnafirði, prógvar hann, at vónirnar hann hevði til toskaaling í Føroyum, halda bæði væl og virðiliga. - Fyri mær, sum alt mítt lív havi fingist við at granska og menna toskaaling, er hetta tað positivasta, eg havi upplivað, sigur hann sambært heimasíðuni hjá Vinnuvitan Her er einki kanska og her eru eingi fyrivarni. Úrslitini av royndunum við toskaaling á Árnafirði er tað positivasta, hann hevur upplivað. - Skuldi tað hent, at svinnið eisini er lítið í hesi royndini á Árnafirði, so er tað enn ein sólskinssøga í toskaalingini, sum eg ikki trúði, at eg fór at uppliva, leggur hann afturat.

## Byggja út á Gørðunum

Í eitt mannaminni hevur handil verið á Gørðunum í Vági, og nú verður handilin á Gørðunum bygdur út. Alex Vilhelm, stjóri, sigur við Suðuroyarportalin, at nú handilin verður bygdur út, verða tað væl størri møguleikar og ikki minst, so kunnu tey bjóða ein nýggjan og spennandi handil fram. Norður- og eystursíðan á bygninginum verður glas. Ymiskir avslutningar verða gjørdir við mahogni, og fer hetta at pynta nógv um, væntar Alex Vilhelm. Í vikuni vórðu sperrur reistar, og vænta tey at verða liðug við útbyggingina áðrenn 1. desember í ár. Umframt at byggja út, fara tey eisini at fríðka um á Gørðunum og verður parkerinsplássið eisini gjørt av nýggjum.

# Einaferð var tað ... ein barnagarður

**Hoyvík:** Í hesum døgum eru liðin 25 ár síðani at dagstovnurin í Hoyvík lat dyrnar upp á fyrsta sinni.

Henda merkisdag vildu hvørki dagstovnurin ella býráðið lata fara aftur við borðinum uttan ein sjónliga markering.

Byrjað varð longu klokkan hálvgum átta í morgun við morgunmati til foreldrini og børnini, so hvørt sum tey komu í dagstovnin. Á middegi var so ein góður døgurðabiti á skránni til børnini.

Seinnapartin var eisini nógv gjørt burtur úr. Millum teir hábornu gestirnar komu tann so væl umtókta Meyla, og seinni skuldi Jens Marni Hansen syngja fyri børnunum.

Fyrrapartin var annars ein heilt annar promenentur persónur á gátt í dagstovninum. Tað var borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen sum eisini fekk sær ein kaffimunn og eitt prát við børnini og starvsfólkini.

Heðin gav sær eisini stundir at lesa upp brot úr eini søgu fyri børnunum. Og hetta dámdu teimum avbera væl, hóast tey kanska ikki júst mundu fata, hvør ið las søguna.

Tað týdningarmesta var kortini tað, at tey hugnaðu sær!

sb.



*Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen umgyrdur av søguhugaðum børnum í dagstovninum í Hoyvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Við mammu til Nólsoyar

Tá strandfaraskipið Ritan legði frá landi fyrrapartin í morgun, var ein heldur øðrvísi bólkur av ferðafólkum við.

Saman við mammum sínum, fóru ikki færri enn átta børn á eina vitjan í Nólsoy.

Talan var her um ein mammubólk hjá børnum, ið vórðu borin í heim í apríl og í mai mánaði í ár.

Tær hava hitst við jøvnum millum bilum, og ta einu ferðina koma hugskotið fram, um tær ikki áttu at farið til Nólsoyar at vitja ta einu kvinnuna í bólkinum.

Dagurin varð ásettur til at vera í dag, og stutt áðrenn Ritan legði frá landi klokkan hálvgum tíggju hittust átta teirra á Bursatanga og riggaðu til at fara umborð.

Í Nólsoy er ætlanin at tær skulu hugna sær saman, ganga ein túr gjøgnum bygdina og drekka ein kaffimunn saman.

Kvinnurnar og børn teirra vórðu aftur í Havn klokkan 13:20.

sb.




*Átta av kvinnunum standa tilbúnar at fara umborð á Rituna. Vinstrumegin: Rúna Poulsen, Elin Højgaard, Marianna á Dul Fríðberg, Maria Garðsá, Jónrit Halling, Jóhanna Rasmussen, Leona Nielsen og Ann Gvøðny Ólavsson*

*Mynd: Jens Kristian Vang*